# Arbeiðsmaður

**Søkt verður eftir arbeiðsmanni til Brennistøðina.**

**Arbeiðslýsing og førleikakrøv**
Viðkomandi, íð settur verður í starvi, skal verða álítandi, røkin, hava áhuga í og verða við til, at skipa og menna viðurskiftini til móttøku av jarn/-metalburturkasti, móttøku av vandamiklum burturkasti og spillolju.

Neyðugt er vera førur fyri at arbeiða við Sennebogen 835 lessimaskinu, Lefort skrottsaksi og øðrum arbeiðsmaskinum. Umframt at røkja uppgávur á Kommunalu Brennistøðini, kemur lessimaskinan at hava uppgávur uttanfyri brennistøðina.

Ein partur av arbeiðinum er eisini at leiðbeina teimum, ið koma við burturkasti, og at gera uppsøkjandi og leiðbeinandi arbeiði uttanfyri brennistøðina.

**Setanarviðurskiftiøn**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmálanum millum Havnar arbeiðsmannafelag og Havnar arbeiðsgevarafelag

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marius Müller, tekniska stjóra, tlf 315160 ella Mikkjal Absalonsen, deildarleiðara, tlf. 317582.

Á Kommunalu Brennistøðini, ið er ogn hjá Tórshavnar Kommunu, starvast 13 fólk. Kommunala Brennistøðin tekur ímóti dagrenovatión og ídnaðarruski til brenning. Orkan frá brenningini verðu nýtt í fjarhitaskipanini í kommununi. Bilar og jarn verður móttikið, umhvørvisviðgjørt, samantrýst, fyri síðan at verða sent uttanlannds til endurvinningar. Vandamikið burturkast verður móttikið, pakkað og síðan sent til Kommunukemi til viðgerar. Spillolja verður móttikin og víðarivigjørd á IRF. Rottangar verða tømdir við KSA skipan.

Kommunala Brennistøðin er arbeiðspláss ið stendur fyri stórum avbjóðingum fyri framman. Heima sum burtur verður lagdur stórur dentur á minkan av alheimsdálkingini Tann ið settur verður í starvið skal hava áhuga fyri og kenna tað sum sýna ábyrgd, at náða tey mál, ið givin eru og sum Kommunala Brennistøðin arbeiðir ímóti.

# Pedagogar

**Søkt verður eftir 3 pedagogum til Býlingshúsið á Ternuryggi.**

**Størvini**
Talan er um eitt 40 tíma starv í einari nýggjari barnagarðsstovu, ið er í gerð og tvey 30 tíma størv í verandi barnagarðsstovu. Ætlanin verður stovnurin liðugt útbygdur fyrst í november mánaði og søkt verður eftir pedagogunum at byrja um hálvan november ella eftir avtalu.

**Stovnurin**
Á stovninum búleikast 20 barnagarðsbørn og 11 vøggustovubørn, harumframt fer nýggja stovan at hýsa 20 barnagarðsbørnum.

**Førleikakrøv**
At tú ert útbúgvin pedagogur. At tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Heidi Henriksen, leiðara, á tlf. 318626 ella Katrin Petersen, samskipara, á tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við viðmælum prógvum og upplýsingum um royndir, skulu vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5A , 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 8. oktober 2000.

Tórshavnar kommuna



# Skeið í AUTOCAD 2D
## 9.-10. oktober 2000

| | |
|---|---|
| Undirvíst verður í: | Pappírsuppsetan og teknihøvd, layout, xref-filer, projektering yvir alnetið og útplottan við layout faciliteter |
| Skeiðleiðarar: | Århus Tekniski Skúli |
| Skeiðkostnaður: | Kr. 2.500,- (skal gjaldast við tilmelding) |

# Skeið í AUTOCAD 2D
## 11.-13. oktober 2000

| | |
|---|---|
| Undirvíst verður í: | Tí 3-dimensionelle rúminum til konstruktión og visualisering av evnum, eisini framleiðsla av eksploderaðum tekningum. Arbeitt verður við tekstures, ljós og skugga til visualisering av tilfarinum á yvirflatuni |
| Skeiðleiðarar: | Århus Tekniski Skúli |
| Skeiðkostnaður: | Kr. 3.500,- (skal gjaldast við tilmelding) |
| Tilmelding: | **seinast 28. sept. 2000** |

**Luttakarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin »VITAN«, kunnu søkja um stuðul haðani.**

Fráboðan um luttøku og nærri frágreiðing (eisini um innivist v.m.), fæst við at venda sær til skúlan á tlf. 311957 (mánadag-fríggjadag, kl. 8-12 & 13-16).

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • Boks 239
FO-110 Tórshavn

# Pedagogur og hjálparfólk søkist til vøggustovuna

Vegna pedagog og hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi er eitt pedagogstarv 30 t. um vikuna leyst til setan skjótast gjørligt og fram til 1. des. 2001 og eitt hjálparfólkastarv 25 t. um vikuna frá 1. jan. 2001 og fyribils fram til 15.07.2001.

Løn og setanartreytir eru samb. sáttmála millum Fø. Pedagogfelag og Fø. Landsstýri.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett ístaðin.

Umsóknir saman við prógvum og ummælum verður at senda til

**Dagstovnin á Oyri**
460 Oyri

Umsóknarfreistin er 7/10 2000.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Jannie Christensen á tlf. 422552.

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Citroen XSARA 1.9 TDiesel
**Árg.:** 08/05-1999
**KM:** 38795

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú og kann síggjast á bilverkstaðnum SP/F Ivan Johansen Bilar, Hoyvíksvegur 63, 100 Tórshavn.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

tlf. 345600 · beinleiðis 34 57 26
fartlf. 288592 · fax 34 56 07
John Ellefsen
at hitta millum kl. 10 og 12

# Urtagarðsarbeiði

Vit gera alt urtagarðsarbeiði.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
**v/Mass Jensen, Nólsoy**
Tlf. 32 71 31 – 28 39 53

# Frá Fuglafjarðar kommunu

Søkt verður eftir reingerðingarfólki til nýggju læknahølini í miðhæddini í Føroya banka 2 tímar dagliga.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til býráðsskrivstovuna telefon 444006.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 2. oktober 2000 kl. 16.00.

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 21. september 2000
**Fuglafjarðar kommuna**



# Ynskir tú eitt sera spennandi arbeiði við góðum framtíðarmøguleikum?

## Verð partur í søluliðnum hjá Ford!

**Vit leggja stóran dent á, at tú hevur áræði, vísir ábyrgd og at tín arbeiðsbyrða ikki liggur eftir í einum søluteami, har kundatænasta og samstarv eru lyklaorðini.**

**Skriva okkum nøkur orð um teg ella støkk inn á gólvið.**

**P/F Wenzel**
**Við Velbastaðvegin**
**100 Tórshavn**
**Tel. 31 38 73**
*Att.: Peter S. Petersen og Leif Hovgaard*

Ford **P/f Wenzel** Ford
www.wenzel.fo

Sosialurin - 311820

# Fulltrúi

**Starv sum fulltrúi í Vinnumálastýrinum er leyst at søkja**

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- Ráðgeving
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- At hava eftirlit við stovnum
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur samfelagsfrøðiliga útbúgving, eitt nú cand. scient. pol., cand. jur. ella cand. polit. og hevur góðan kunnleika um edv. Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, og duga at arbeiða sjálvstøðugt.

Starvið er til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir. Vit bjóða:
- Flex-tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsókn við prógvum o.ø. skal verða send til:

**Vinnumálastýrið**
**Postrúm 377**
**110 Tórshavn**

Umsóknin skal vera okkum í hendi tann 16. oktober 2000. Starvið verður sett skjótast tilber.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja til Arna Poulsen á tel 35 60 60.

team 85 · 31 65 11

**V I N N U M Á L A S T Ý R I Ð**

# Tvøroyrar Kvøldskúli veturin 2000/2001

Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli bjóðar í vetur hesi skeið fram:

**Frítíðarundirvísing**

| Lærugrein | Tilmelding hjá | Tlf. |
|---|---|---|
| **Hondarbeiði:** | Judith Holm | 371168 |
| **Seyming** (kvøldskeið ella dag og vikuskiftisskeið) | Karolina Enni | 371690 |
| **Veving** | Óluva Joensen<br>Kirsten Danielsen | 371001<br>371934 |
| **Ættarkanning** | Jonny Dimon | 371180 |
| **Máling**/tekning | Palle Julsgart | 371669 ella 371976 |
| **Smíð**/modelsmíð | Mikkjal Bærendsen | 372103 |
| **Matgerð** (klænkikostur) (byrjar í viku 40) | Tina Midjord | 371962 |
| **Fyrstahjálp** (grundskeið) | Naja Mortensen | 371567 |
| **Tónleikur:** Hornblástur<br>Orgulspæl | Terji Jacobsen<br>Jens Mortan Mortensen | 371300<br>375917 |
| **Grundskeið í tekstviðgerð:** | | |
| Ónsdag (byrjar í viku 2, 2001)<br>Týsdag (byrjar í viku 40, 2000) | Heri Thorsteinsson<br>Páll Michelsen | 371632<br>371821 |
| **Framhaldsskeið í tekstviðgerð:** | | |
| Ónsdag (byrjar í viku 40, 2000)<br>Týsdag (byrjar í viku 2, 2001) | Heri Thorsteinsson<br>Páll Michelsen | 371632<br>371821 |
| **Motionsfimleikur** | Mariann Johansen | 371340 |
| **Venjingar í heitum vatni.** Skeiðið er ætlað teimum, sum hava MB. Becterew og liðagikt | Marjun Olsen | 372888 |

Øll undirvísing er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning av myndugleikunum.

Tilmeldingargjaldið er 100 kr. + 3 kr. fyri undirvísingartíman.

**Tvøroyrar Kvøld- og Ungdómsskúli tlf. 371582**

# Eiðis Kvøldskúli veturin 2000/2001

hevur Eiðis kvøldskúli hesi tilboð:

| Lærugrein | Lærari | Tlf. |
|---|---|---|
| **Ættargransking**<br>Týskvøld kl. 19.00 | Maria Jacobsen | 44 73 91 |
| **Ymiskt handarbeiði**<br>Vikuskiftisskeið | Katrin Hansen | 42 34 91 |
| **Veving**<br>Mikukvøld kl. 19.00 | Poulina Jensen | 42 23 44 |
| **Motiónsfimleikur fyri vaksin**<br>Týs- og hóskvøld kl. 19.00 | Marjun í Jákupsstovu | 42 35 54 |
| **Ítrótt fyri rørslutarnað**<br>Mikukvøld kl. 19.00<br>(best millum kl. 19 og 21) | Marjun í Jákupsstovu | 42 35 54 |
| **Teldulæra** (byrjunarstøði)<br>Hóskvøld | Jens M. Rasmussen | 44 21 98 |
| **Internet og heimasíður**<br>Vikuskiftisskeið | Jens M. Rasmussen | 44 21 98 |

Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er kr. 100,- fyri hvørja lærugrein. Tekning fer fram hjá lærarunum í seinasta lagi mikudagin 4. oktober 2000.

Undirvísingin er treytað av nóg stórari luttøku og góðkenning frá myndugleikunum.

**Eiðis kvøldskúli, tlf. 42 30 92 fax 42 34 80**